## 20 milliónir svølta

Meiri enn 20 milliónir fólk á Afrikanska Horninum hava tørv á mati. Tað sigur matvørustovnurin hjá ST, WFP. Orsøkin til neyðina er áhaldandi turkur í Eritrea, Somalia, Ethiopia og Kenya. Sagt verður, at tað hevur ikki regnað í umráðnum í samfull tvey ár. ST sigur, at matvøruhjálp er á veg til tey neyðstøddu, men at tað gongst illa at fáa matin fram, millum annað tí at havnin í Djibouti er ov lítil til tær stóru nøgdirnar, sum koma hagar. World Food Programme sigur, at støðan er serliga hættislig í Eritrea, og at søðan versnar í hvørjum.



## Vatn á mánanum

Vísindafólk eru ovfarin av nýggjum kanningum, sum vísa, at tað er helst nógv meiri vatn á mánanum, enn vísindin hevur hildið. Tær nýggju kanningarnar byggja millum annað á myndir, sum indiska kanningarfarið Chandrayaan hevur tikið. Amerikanski vísindamaðurin Larry Taylor sigur við BBC, at eftir hansara meting ber tað til at fáa ein litur av vatni við at kroysta ein rúmmetur av mánatilfari. Myndir, sum amerikanska farið Deep Impact og tað evropeiska Cassini hava tikið, siga somu søgu sum myndirnar hjá tí indiska kanningarfarinum, sigur BBC.

# Landsstýrið strikar tunlarnar

**Bæði undirsjóvartunnilin til Sandoynna og tunlarnir norður um Fjall eru strikaðir í fíggjarlógaruppskotinum, sum fer niðan í tingið í morgin. Líkt er til hart stríð í Fíggjarnevndini**

FÍGGJARLÓG

*Heini í Skorini*
*heini_skorini@yahoo.com*



*Hvørki fíggjarmálaráðharrin Jóannes Eidesgaard ella Kaj Leo Johannesen, løgmaður, hava nakra viðmerking, men keldur í samgonguni vátta, at landsstýrið hevur strikað játtanirnar til bæði Sandoyartunnilin og tunlarnar norður um Fjall í ársins fíggjarlógaruppskoti. Gerhard Lognberg hóttir við at fara úr bæði samgongu og flokki, og samgongulimir úr Norðoyggjum kennast heldur ikki við avgerðina*

Hósdagin 29. november var veitsludagur í Sandoynni. Fýrverk, floytandi bilar og hundraðtals fólk høvdu leitað sær oman á keiina at taka ímóti teimum báðum tinglimunum úr oynni, Gerhardi Lognberg úr Javnaðarflokkinum og Álli á Reynatúgvu úr Tjóðveldi.

Orsøkin til veitslurómin var, at løgtingið sama dag hevði samtykt at gera fast samband millum Gomlurætt á Streymoynni og Traðardal á Sandoynni við 24 atkvøðum fyri, tveimum blonkum og tveimum ímóti.

### Fólkaflokkurin tapt

Men knøpp tvey ár seinni sær svart út. Keldur í samgonguni vátta, at bæði undirsjóvartunnilin til Sandoynna og tunlarnir norður um Fjall, sum ganga úr Klaksvík til Árnafjarðar og av Árnafirðum til Norðtoftir, eru strikaðir í ársins fíggjarlógaruppskotið, sum landsstýrismaðurin í fíggjarmálum, Jóannes Eidesgaard, skal bera niðan í tingið fyrsta dagin. Sjálvur hevur fíggjarmálaráðharrin onga viðmerking, fyrr enn uppskotið verður lagt fram í næstu viku.

Sum skilst hava tunlarnir verið ein snúningsdepil í telvingunum millum landsstýrisfólkini seinastu dagarnar. Og sambært keldum í samgonguni hava Javnaðarflokkurin og Sambandsflokkurin tvíhildið um, at samgongan ikki hevur ráð til hesar báðar íløgurnar á komandi fíggjarlóg. Fólkaflokkurin hevur harafturímóti strongt á fyri at fáa pening játtaðan til tunlarnar, men hann hevur ikki fingið sítt ynski ígjøgnum.

Í komandi fíggjarári er talan einans um nakrar fáar milliónir krónur at spara, men samanlagt kosta hesar báðar verkætlanir omanfyri eina milliard, sum landskassin kann spara í 2011 og 2012, um samgongan sleppir ætlanunum um tunlarnar.

### Brot á samgonguskjalið

Fyrr í vikuni søgdu bæði Javnaðarflokkurin og Fólkaflokkurin, at útspælið hjá Sambandsflokkinum um at prístalsregulera blokkin var í stríð við samgonguskjalið og kundi tí ikki gjøgnumførast. Men trupult verður at sameina orðingarnar í samgonguskjalinum um Sandoyartunnilin við tað fíggjarlógaruppskot, sum nú fer niðan í tingið. Um undirsjóvartunnilin til Sandoynna stendur soleiðis í samgonguskjalinum: "Arbeitt verður víðari við verkætlanini at gera fast samband um Skopunarfjørð herundir við at finna fíggingarleist. Tá liðugt er at gjalda til Norðoyatunnilin næsta ár, verður samsvarandi árlig upphædd flutt til Sandoyartunnilin, og farið verður í gongd í 2011".

### Einki er avgreitt

Men einki er liðugt, fyrr enn alt er liðugt. Sum til ber at lesa um aðrastaðni í blaðnum vátta fleiri tinglimir, at samskiftið millum tinglimir og landsstýrisfólk hevur verið lítið og einki. Samgongutinglimirnir úr Norðoyggjum Jákup Mikkelsen, Anfinn Kallsberg og Bjørn Kalsø vilja allir hava tunlarnar norður um Fjall á ársins fíggjarlóg. Og Gerhard Lognberg lovar sum vera man at kempa til tað seinasta fyri undirsjóvartunlinum til Sandoynna.

Tí er líkt til hart stríð í løgtinginum og ikki minst í Fíggjarnevndini, tá landsstýrismaðurin hevur handað tinginum uppskotið. Seinnu árini hevur fíggjarlógaruppskotið verið fyri ovurstórum broytingum undir viðgerðini í løgtinginum, og tí er slagið um tunlarnar ikki avgreitt, fyrr enn fíggjarlógin endaliga skal samtykkjast við árslok í 2009.

Sambært keldum í samgonguni hevur Fólkaflokkurin tapt fyrsta umfar í telvingini um tunlarnar. Men Fíggjarnevndin hevur ein formann við navninum Anfinn Kallsberg, sum í mong ár hevur havt tunlarnar norður um Fjall sum sítt hjartabarn. Og hann hevur áður víst, hvussu man fær sítt ígjøgnum.

# - Løgmaður er Føroya størsti svíkjari

**Gerhard Lognberg hóttir við at fara úr bæði samgonguni og Javnaðarflokkinum, um Sandoyartunnilin ikki fær pengar á komandi fíggjarlóg**

FÍGGJARLÓG

*Heini í Skorini*
*Heini_skorini@yahoo.com*

Hósdagin seinnapartin kundi Gerhard Lognberg vátta tíðindini um, at landsstýrið hevur strikað játtanina til Sandoyartunnilin og tunlarnar norður um Fjall í fíggjarlógaruppskotinum, sum formaðurin hjá Gerhardi, Jóannes Eidesgaard, í næstum fer at handa tinginum. Og hesum kann tingmaðurin úr Skopun ikki liva við.

- Løgmaður er Føroya størsti svíkjari, tí hetta er greitt í stríð við samgonguskjalið. Fíggjarlógin skal ikki samtykkjast fyrr enn í desember, og eg ætli mær at stríðast til tað seinasta, sigur Gerhard Lognberg.

Tað eru m.a. floksfelagarnir hjá Gerhardi í Javnaðarflokkinum, sum hava grundgivið fyri, at ráð ikki eru til ein Sandoyartunnil, soleiðis sum búskapurin hevur tað í løtuni. Gerhard lovar at taka "eina kraftiga avgerð", um endin verður, at Sandoyartunnilin ikki fær pengar á ársins fíggjarlóg. Men merkir hetta, at hann fer at taka seg úr flokkinum og samgonguni?

- Tað er í øllum førum nærliggjandi, sigur Gerhard Lognberg.